Búskapur og vinna:

## Stórt hall

Stóra tryggingarfelagið If, sum hevur viðskiftafólk í Danmark, Noregi og Svøríki, hevði eitt vánaligt ár í fjør.

Sambært ársroknskapinum, sum júst er almannakunngjørdur, hevði tryggingarfelagið næstan 2,5 mia. krónur í halli í fjør. Leiðslan sigur, at tað vánaliga úrslitið kemst av stórum skaðaútreiðslum, samstundis sum felagið hevði lítlan vinning av sínum kapitaliløgum.

Á nýggjárinum løgdu If og finska tryggingarfelagið Sampo saman. Leiðslan væntar ikki ta stóru framgongdina í ár, men ivast ikki í, at felagið fer at fáa avlop, sum frá líður.

## Verja vinnuna

Svenska stjórnin hevur sett seg upp ímóti einum uppskoti hjá ES um at broyta partafelagslógina, soleiðis at hvørt partabræv skal hava sína atkvøðu, sama um talan er um A ella B-partabrøv.

Herfyri var ein sendinevnd hjá svenska vinnulívinum í Bruxelles og mótmælti uppskotinum, og nú hevur Gøran Persson, forsætisráðharri boðað frá, at stjórnin tekur undir við vinnulívinum.

Tað er heldur ikki uttan orsøk, at sviar mótmæla ætlanini hjá ES. Hyggja vit at stóru fyritøkuni Ericsson, so eru tað útlendingar, sum eiga nógv tann størsta partin av partabrøvunum. Wallenberg og Handilsbankin eiga 9 prosent av partapenginum, men hava kortini 80 prosent at atkvøðunum, tí ey hava bert A-partabrøv.

Svenski løgmálaráðharin, Thomas Bodstrøm, sigur, at stjórnin hevur gjørt av at styðja sjónarmiðini hjá vinnulívinum, tí verandi skipan er gomul í Svøríki, og stjórnin heldur tað vera rætt at verja hana.

Stjórnin vil eisini vera við, at verandi skipan er góð fyri svenska vinnulívið og samfelagið, tí hon tryggjar nógv arbeiðspláss. Fer avgerðarrætturin av landinum, kann alt hetta koma í vanda, sigur stjórnin.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Til reiðar at verja Milosevic



*Slobodan Milosevic á veg inn í rættarsalin í Haag í gjár*

**Tað kann kanska tykjast løgið, at nakar er til reiðar at verja fyrrverandi jugoslaviska forsetan, Slobodan Milosevic, men hóast tær sera grovu ákærurnar stendur hann minni enn so einsamallur.**

MILOSEVIC-MÁLIÐ

*Árni Joensen*

Bæði einstaklingar og felagsskapir eru til reiðar at verja Slobodan Milosevic, og síðani rættarmálið byrjaði týsmorgunin, hava verjar hansara skipað fyri fleiri tíðindafundum, har teir hava greitt frá, hví fyrrverandi jugoslaviski leiðarin er ósekur.

Teir vilja vera við, at Milosevic gjørdi ikki annað enn at verja land sítt ímóti ágangi og yvirgangi, og at hann gjørdi tað á lógligan hátt. Verjarnir hava skipað seg í ein felagsskap, sum hevur sína heilt egnu frágreiðing um tað, sum hendi á Balkan.

Eitt nú vil felagsskapurin vera við, at tann nýggja stjórnin í Beograd tók valdið við einum statskvetti, sum var fyriskipað og fíggjarliga stuðlað av stjórnini hjá Bill Clinton, forseta í USA.

Spurdir, hví bara 200 serbar mótmæltu, tá Milosevic varð handtikin, svara verjarnir, at fleiri túsund løgreglumenn tóku lut í handtøkuni, sjálvt um eingin gjørdi mótstøðu. Uppgávan hjá løgreglumonnunum var harafturímóti at forða fyri, at fólk sluppu at mótmæla, og tí vóru tað bara 200 mótmælisfólk, sum vóru at síggja.

**Burturfluttur**

Verjufelagsskapurin vil eisini vera við, at jugoslaviska stjórnin flýggjaði ikki krigsbrotsmannadómstólin um í Haag Milosevic, men at hann harafturímóti varð burturfluttur. Verjarnir siga, at tað var serbiski forsætisráðharrin, Zoran Djindjic, sum skipaði fyri burturflytingini, og teir vilja vera við, at Djindjic hevur tætt samband við mafiuna og útlendskar fregnartænastur.

Felagsskapurin sigur seg hava meiri enn hundrað virknar limir í 30 londum. Tann best kendi er fyrrverandi amerikanski løgmálaráðharrin, Ramsey Clarke, og millum hinar eru bretski sjónleikarin Harold Pinter, grikski tónleikasmiðurin Mikis Theodorakis og eysturríkski rithøvundurin Peter Handke.

Eins og Milosevic vilja verjarnir vera við, at krígsbrotsmannadómstólurin í Haag er ódemokratiskur og ólógligur.

# USA fer at koyra Saddam frá

**Fyrrverandi amerikanski ST-sendiharrin, Richard Holbrooke, sigur, at amerikanska stjórnin fer at royna at koyra irakska forsetan frá**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*

Tað var í einari samrøðu við bretska sjónvarpið BBC, at Richard Holbrooke segði frá, at George W. Bush, forseti ætlar sær at fara eitt stig longur enn faðirin, sum sendi ein altjóða her at reka iraksku hermenninar úr Kuwait, men sum aftraði seg við at lata herin halda leiðina fram til Bagdad.

Richard Holbrooke vísti á, at Bush forseti hevur at kalla teir somu ráðgevar, sum faðir hansara hevði, tá hann var forseti, og at hesir ráðgevararnir hava ásannað, at tað var eitt mistak, at teir ikki mæltu forsetanum til at taka Bagdad fyri ellivu árum síðani.

- Hetta er í veruleikanum tað størsta mistakið í amerikanskum uttanríkispolitikki seinastu 20 árini, og tað vita ráðgevararnir, segði Holbrooke við BBC.

Í síðstu viku segði Colin Powell, uttanríkisráðharri, at Bush forseti er í ferð við at kanna, um USA skal fyrireika eina hernaðarliga atgerð ímóti Irak sum lið í bardaganum ímóti altjóða yvirganginum..

Richard Holbrooke, sum var ST-sendiharri hjá Bill Clinton, heldur, at Bush gjørdi eitt mistak, tá hann lýsti Iran, Irak og Norðurkorea sum eitt óndsinnað kervi.

- Tað finst einki tílíkt kervi. Tey trý londini eru ymisk. Irak er tann størsti trupulleikin, sigur fyrrverandi ST-sendiharrin.

Úr Norðurlondum:

## Roykja ov illa

Norska stjórnin hevur gjørt av at fara í hernað ímóti royking. Hagtøl vísa, at 32 prosent av øllum norðmonnum roykja. Tað heldur stjórnin vera alt ov nógv og samanber m. a. við Svøríki, har bara 19 prosent roykja.

Norski heilsumálaráðharrin, Dagfinn Høybråten, sigur, at myndugleikarnir fara at gera nógv burtur úr fyribyrgingararbeiðinum, og hann hevur sett sær sum mál, at um fimm ár skal talið á norskum roykjarum koma niður ímóti teimum 20 prosentunum.

Tað merkir, at millum 200.000 og 300.000 norskir roykjarar skulu leggja sigarettirnar frá sær. Eydnast tað, er tað eitt munandi framstig samanborið við tað, sum heilsumyndugleikarnir higartil hava fingið burtur úr sínum átøkum ímóti tubbaki.

Ætlanin hjá heilsumálaráðharranum er m. a. at banna teimum sonevndu "light"-sigarettunum, tað skal gerast lættari at sekta brot á lógina um tubbaksreklamur, og so ætlar ráðharrin eisini at seta forboð fyri royking á matstovum.

Dagfinn Høybråten heldur, at tað almenna eigur eisini at hjálpa fólki at leggja av at roykja. Ráðharrin sigur, at royking verður vanliga mett sum eitt privatmál hjá tí einstaka, men ein eigur eisini at hugsa um, at talan er um at bjarga mannalívum.

## Vatnflóð

Tað ljóðar næstan sum skemt, men gjáranáttina var vatnflóð nógvastaðni í býarpartinum Vanløse í Keypmannahavn. Løgreglan mátti á náttartíð purra fólk út, tí nógvir kjallarar stóðu undir í vatni, eftir at ein hol var komið á eina vatnleiðing. Tað vísti seg, at 57 kjallarar stóðu undir í vatni.

Sumstaðni var so nógv vatn komið inn, at tað stóð heilt upp undir kjallaraloftið.

Vatnleiðingin, sum var farin at leka, var ein metur í tvørmát.



# Bilar

Nr. 31 • hósdagur • 14. februar 2002 • 76. árg.


# Berg Motors – Avon dekk beinleiðis frá verksmiðjuni




*Dekksølan hjá Berg Motors í Hálsi. Umframt Avon selja teir eisini Toyo, Eurostone og Michelin dekk*

**Hjá Berg Motors á Hálsi, ið umboða bilmerkini Mazda og Scania, eins og Avis bilaútleigan, hava teir nú í skjótt eitt ár havt egna dekksølu við dekkverkstaði. Fyritøkan innflytir Avon dekk beinleiðis úr Onglandi**

DEKKSØLA

*Magnus Gunnarsson*

Hjá teimum sum selja dekk eru tað tvey hæddarpunkt á árinum, hvat dekksølu og dekkskiftum viðvíkur. Tað er tíðarskeiðið um 1.mai, tá píkadekkini sambært lóg, skulu takast av, og tá fyrsta hálkan kemur, eftir hálvan oktober, tá aftur loyvt er at koyra við píkadekkum.

**Nýggj dekksøla**

Í fjør, nakað áðrenn 1.mai, lat ein nýggj dekksøla upp hjá Berg Motors á Hálsi í Havn. Leiðari á dekksøluni er Gundur Hansen, ið hevur drúgvar royndir innan dekkarbeiðið í Danmark. Á bilasøluni hjá Berg Motors hevur altíð verið eftirspurningur eftir dekkum til bilarnar hjá teirra egnu kundum.

**Innflyta beinleiðis**

Hendan eftirspurning hevur fyritøkan klára við at útvega dekk frá ymiskum dekksølum í landinum. Í 1996/97 byrjaðu teir so smátt at innflyta dekk og felgur til at nøkta tørvin hjá teirra egnu kundum. Síðan nýggja dekksølan lat upp í fjør, eru teir blivnir aðalumboð fyri Avon verksmiðjuna í Onglandi.



*Gundur Hansen er leiðari at Dekksøluni. Hann hevur í fleiri ár starvast hjá stórum dekkfyritøkum í Danmark*

Dekkini roynast sera væl, og sigast at vera tey bíligstu í landinum.

**Útbyggja verkstaðin**

Umframt Avon selja teir eisini dekkmerkini Toyo, Eurostone og Michelin. Felgur eru blivnar ein stórur partur av virkseminum hjá fyritøkuni. Sportfelgur í flestu støddum til øll bilmerkir og í fleiri sniðum eru altíð á goymslu. Eisini her eru prísirnir sera kappingarførir. Í dag selur fyritøkan dekk til persón og vøruvognar. Í framtíðini er ætlanin at víðka virksemi.

## Avon ZZ3



*Avon verksmiðjan er komin á marknaðin við einum heilt nýggjum framkomnum summardekki, ið teir nevna Avon ZZ3. Dekkið er uppbygt við beltum úr siliciumdioxid og monoxide, hendan blanding gevur sera gott vegtak á bæði vátum og turrum undirlagi. Dekkmynstrið er designað soleiðis at vatnið sleppur skjótt burtur, og dekkið er sera ljóðleyst*

## Bilen Motor & Sport

Kenda danska bilblaðið, Bilen Motor & Sport, bleiv um árskiftið lagt saman við "Bil Magasinet", sum eisini er heitið á nýggja samanlagda blaðnum

*Kelda: Bil Magasinet*

## Yaris facelift



Eftir at hava verið fýra ár á marknaðinum, fær Toyota Yaris, seinni í ár, eina lætta "facelift" við smábroytingum av kúfangara og lyktum. Eisini verður 1.0 litur motorurin gjørdur til at klára tey nýggjastu krøvini til umhvørvisdálking

*Kelda: Bil Magasinet*

## Kangoo Diesel



Í vár kemur Renault Kangoo við tevimum nýggjum 1.5 liturs common rail dieselmotorum við ávikavist 65 og 82 hk

*Kelda: Bil Magasinet*